# Randi og Andras eru ársins málverjar



*Randi Wardum og Andras Gango eru ársins málverjar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**ÁRSINS MÁLVERJI** Randi Wardum og Andras Gangó vóru bestu málverjarnir í føroysku landskappingini

Uni Holm Johannesen

Randi Wardum og KÍ vunnu aftur greipuna í ár.

Umframt flottu úrslitini í heimligu kappingunum, stóðu kvinnurnar úr Klaksvík seg eisini væl í altjóða kappingini fyri meistarar.

KÍ hevur verið einaráðandi, og Randi Wardum var sjáldan sett undir veruligt trýst í hesum kappingarárinum.

Men hon er besti málverjin í kvinnudeildini.

Tað hevur hon verið so ofta, at hon hevur gloymt, hvussu ofta hon er kosin ársins málverji.

Hon hevur hinvegin verið í betri venjing fyrr.

– Eg spældi í Íslandi fyri tveimum árum síðan, og tá var eg betri, enn eg eri í dag. Málmansvenjing verður ikki raðfest serliga høgt í Føroyum. Tað er spell, tí tað ger stóran mun, sigur Randi Wardum.

**Andras best hjá monnum**

Andras Gango skifti úr ÍF til NSÍ undan kappingarbyrjan í ár.

Tað eydnaðist so mikið væl, at hann er kosin ársins málverji í føroyskum fótbólti fyri fyrstu ferð.

26 ára gamli ungarin vann framman fyri Jákup Mikkelsen, sum loysti Gangó av í Fuglafirði.

– Jákup Mikkelsen er millum bestu málverjarnar í Føroyum nakrantíð. Tað er stuttligt at vera framman fyri hann, sigur András Gangó, sum er errin av herðaklappinum.

Tað er longu greitt, at Gango spælir eisini við NSÍ í 2011.

*uni@sosialurin.fo*

# Lars Muller er ársins dómari



*Ársins dómari, Lars Müller*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**ÁRSINS DÓMARI** Eins og í fjør, varð Lars Muller kosin ársins dómari

Uni Holm Johannesen

Eingin hevur staðið dómaravrikunum hjá Lars Muller kurl, sambært liðskiparunum, venjarunum og fjølmiðlunum.

Leygarkvøldið varð hann heiðraður.

– Eg dugi ikki at siga, hví eg eri valdur. Eg havi verið heppin í kroystum og ivasomum støðum, tí eg havi oftast dømt rætt. Tað er kanska tað, sigur Lars Muller.

Hann harmast somuleiðis um, at tað ikki eru fleiri fótbóltsdómarar í Føroyum. Lars vísir á, at dómararnir hava eitt fantastiskt samanhald, sum hann tekur til, og at teir gleða seg longu til komandi kappingarár.

*uni@sosialurin.fo*



*Rannvá Andreasen er ársins leikari og toppskjútti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Rannvá gekk aftur fremst

**ÁRSINS LEIKARI** Rannvá Andreasen, KÍ, var toppskjútti í bestu kvinnudeildini í 2010. Leygarkvøldið fekk hon heiðurin sum ársins spælari

Uni Holm Johannesen

Rannvá Andreasen er millum fremstu kvinnuligu fótbóltsspælararnar í Føroyum nakrantíð.

Hon hevur skotið mál í hópatali, og hon hevur átt stóra leiklut í, at KÍ hevur verið fullkomiliga einaráðandi í føroyskum kvinnufótbólti seinastu árini.

Í ár skeyt hon 31 mál í 22 dystum.

– Vit hava spælt framrættaðan fótbólt, og eg eri nøgv við í spælinum sum framherji. Tað sleppi eg nærmast ikki undan, sigur Rannvá Andreasen.

Hon leggur afturat, at hon hevur vunnið heiðurin so ofta, at hon hevur mist talið.

*uni@sosialurin.fo*

# 15 ára gomul fekk gjøgnumbrotið

**ÁRSINS STJØRNUSKOT** Bara 15 ára gamla Maria K. Thomsen, KÍ, sum hevur spælt sítt fyrsta kappingarár í fremstu røð hjá kvinnum, er ársins stjørnuskot

Uni Holm Johannesen

Hon hevur skotið fimm mál í 14 dystum.

– Nú verður landsliðið tað næsta, sigur hon skemtandi.

Maria K. Thomsen og KÍ vunnu greipuna í ár.